# Ein væleydnað Íslandsferð

Sólvit Simonsen hugleiðir um íslandsferð hjá kunningarstovum í marsmánaði

ÍSLANDSFERÐ
*Sólvit Simonsen*



### Seinni partur

Mikudagur t. 3/3-04: Aftan á góðan náttarblund gjørdu vit okkum klár til dagin eftir. Men illveðrið leikaði í, so boðini vóru, at onki flogfar kom fyribils. Tí gjørdi okkara góði ferðaleiðari Dávíd av, at vit máttu fara at ragga okkum ávegis við bussinum ímóti Reykjavíkini. Leiðin gekk fyrst ímóti Akureyri, men so hendi tað, aftan á av vit høvdu koyrt í umleið ein tíma, at telefonin hjá Dávídi ringir og sagt var at flogfari lendir kl 11. So bleiv tosa saman og avgjørt var, at venda við, ímóti flogfarinum. Men ágrýtin, sum Dávíd var, vildi hann nýta alla tíðina og bað Svenna koyra til Lagarfljót, har vit fóru inn at síggja Skriðuklaustur. Hetta var gamal prestagarður, sum seinni bleiv keyptur av Gunnari Gunnarssyni og brúktur sum bóndagarður. Á hesum garði starvaðust nógvir føroyingar í krígstíð og aftan á kríggið. Men tíðin gekk undan, vit fóru í skundi í bussin, har okkara vinarligi og góði bilførari setti ferð á ímóti flogvøllinum. Aftan á middag fóru vit í flogfari, har flogskiparin beyð okkum vælkomin og segði hann okkum, at við Snæfellsjøkull var illveður, annars sá tað gott út. Tað passaði væl, tað vóru nakrar rykkingar í flogfarinum, síðani var alt gott og flogfari lendi í øllum góðum í Reykjavík.

Úr Reykjavík fóru vit til Akranes, har vit fóru á eitt sjósavn. Har var sum aðrastaðni stórur blíðskapur. Vit blivu víst runt. Áhugavert var at síggja alt teir høvdu úr sjónum: rekatrø við klótum og øllum møguligum skapi vóru saga í líka hæddir og stóðu eftir gólvinum. Allir møguligir steinar, geislar úr ymiskum hvalasløgum, stórum og smáum. Alminiumskúlur, glaskúlur, jarnkúlur og allir rekar og annað sum hevði við sjógvin at gera. Har vóru gamaldags smá hús við tí inni, sum hoyrdi teimum til. Somuleiðis bátar og dekkbátar og ikki at gloyma okkara stoltleika "Sigurfarið" sum var vøkur á at líta uppá avstand, men tá ein kemur nær til hana og umborð á hana, varnast ein at illa ber til at seta eitt slíkt gamalt skip uppá land, tað krevur serliga røkt. Haðani koyrdu til Borgarnes og fóru inn á kunningarstovuna, har var blíðskapur, men tosa varð enskt, so eg fekk lítið burturúr.

### Reykholtskirkja

Síðani koyrdu vit til Reykholts kirkju, har Snorri Sturlason helt til. Har var øgiliga stórsligi; ótrúligt at brúka so nógvan pening uppá tílíkt hús. Ein prestafrúa greiddi okkum frá. Men nú var liðið so langt út á kvøldi, so bæði vit og prestafrúan vóru troytt. Tí varð fari aftur í bussin og koyrt ímóti Hvalfjørðinum til Akranes og inná hotel Glymur, har vit fingu eina rimmar máltíð. Tá kundi ásannast orðataki," Frótt er høvur av fullum maga". Aftaná ein stravnan dag fóru vit øll nú til hvíldar á hotel Glymur.

### Hósdagur t. 4/3 04

Kl. 9 kom bussur eftir okkum og koyrdi hann okkum ímóti Hveragerði, har okkara góði leiðari Dávíd hevði skrivstovu. Vit vóru inni á gólvinum og hugdu, og fóru vit síðani at hyggja eftir har sum teir bygdu honum aðra skrivstovu. Hann greiddi okkum frá, hvussu skrivstovan skuldi innrættast. Hetta vóru veldiga stór hølir. Sum Dávíd sjálvur segði frá, so líktust umstøðurnar nógv, hvat tað fíggjarliga viðgekk. Tað var ikki tann stóri pengurin ið teir fingu til rakstur.

Haðani koyrdu vit til Reykholt, har vit vóru og sóu vakstrarhúsini. Maðurin, sum rak tey var eisini borgarstjóri og segði hann okkum, at íslendingar høvdu eina vídd upp á 260.000m2 av vakstrarhúsum. Vit spurdu hvussu tað gekk at selja, og segði hann at tað var ikki bara gott, tí ein hópur bleiv innfluttur og ikki vildu teir krevja innflutningsbann. Sjálvir fluttu teir byrjunar plantur inn úr útlandinum.

Haðani fóru vit við Sveini, sum formaðurin æt, inn í bygdarhúsið. Tað var gjørt og rikið sum mentunarhús. Har var okkum boðið til ein góðan døgverða. Øll skúlabørnini komu samstundis at fáa sær at eta. Vit góvu okkum til síðis, tí at tey høvdu avmarkaða tíð, men tað var ikki talan um. Blíðskortaði bóðu tey okkum fáa okkum fyrst. Gott var at síggja, hvussu vakurt tey stóðu í kø og steðgaðu til tey fingu sín mat.



*Dávíð Sámuelsson var ferðaleiðari hjá føroyska ferðalagnum*
*Mynd: Edvard Joensen*

Til stuttleika kann eg nevna, at tá ið lærararnir vóru farnir út, sá eg, at ein smádrongur argaði eina smágentu,til hon brá sær á, og hølvaði drongin av.

Bygdarhúsið, barnagarðurin og skúlin, stóðu øll tætt saman. Børnini vóru koyrd til skúlan heilt til 30 km burturfrá.

Haðani bleiv koyrt til Geysir.

### Geysir

Síðan eg var har seinast, var stórur handil komin har, við øllum møguligum til sølu. Ein stórur svalur(balkon) var í handlinum, har vóru øll møgulig djórasløg útstappaði, so sum stórir veðrar, ær, stórir hundar og øll møgulig fuglasløg.

Harífrá, fóru vit til eitt pláss sum æt Hestheimar. Hesi hjún høvdu millum 100 og 200 hestar eftir tørvi. Hesar hestar vandu tey til allar møguligar framførslur og venjingin fór fram tað myrku tíðina og vístu fram fyri ferðafólki tá ið tann tíðin kom. Rossini vóru øll úti og segði maðurin okkum, at vanligt var, at tað bleiv dansa línudans, so vit inn í stóru rossakrubbuna at dansa uppi í øllum rossalortinum. Nú eri eg ikki so lættur á mær og heldur ikki blaðungur, so eg sá skjótt, at tær ungur dam-urnar, sum við okkum vóru, vóru bókstaviliga lættari enn vit mannfólkini, sjálvt um tvær av teimum vóru við barn. Men tað var í hvussu so er ógvuliga stuttligt.

Síðan beyð hann okkum inn til sín. Tað var ein teinur at ganga og meðan vit gingu, fóru vit av vegnum og inn í eitt lítið grótbrot. Tað hevði hann sjálvur sprongt inn í helluna og ætlaði at leggja tekju á og síðan brúka tað til at syngja í. Hann var sjálvur í einum kóri. Vit fóru inn, tá fingu vit kaffi og pannukøkur, væl smakkaði....

Tað var eisini vanligt, at hann sang fyri gestum og tað gjørdi hann eisini , hann sang eitt ørindi fyri okkum og tað ljóðaði ógvuliga vakurt. Harnæst ynsktu tey at síggja føroyskan dans. Vit tóku tá saman í køkinum, saman víð íslendarunum "vælkomnir føroyingar her á vási.....gekk sera, sera væl.

Hann greiddi okkum frá, at á hesum lítla plássi, inni á suðurlandinum, búðu ímillum tvey og tríhundrað fólk. Hettar vóru alt ríkmenn. Hettar gjørdi, at størru plássini uttanum, vildu hava tey at leggja saman við teimum, tað vildu tey ikki, tey høvdu tað avbera gott saman har í egnari kommunu.

Harfrá fóru vit til søguskálan. Har var ógvuliga stórt søgusavn. Ein dama greiddi frá á enskum, tað fekk eg tíverri lítið burturúr, men har var ein øgiligur hópur av tilfari.

Síðan koyrdu vit haðani, og meðan vit koyra, sigur Dávíd okkum at nú koyra vit ímóti Eyrabakka. Tá sang eg spakuliga "tætt undir landinum við Eyrabakka, vit mangan morgun mundu hála av við vaðbeini var frøði jú vit takka fyri veiðu íslandshavið okkum gav".

Vit komu so til Eyrabakka, inn í ein gamlan skúla sum var gjørdur til hotel. Har blivu vit, av ferðaráðið Íslands, bodnir til fráfaringarveitslu. Sera góður matur við víni.

Fleiri talur vóru hildnar og heitt var á meg um aftur at syngja um Oyrabakka og tað gjørdi eg og segði somuleiðis nøkur orð. Hetta var sera hugnalig løta og haldi eg, at eg kann siga fyri okkum øll, at brúk er fyri grannunum fyri vestan.

Haðani koyrdu vit til Hveragerði, har gist var um náttina í húsum sum vóru brúkt til endamáli. Sera nosslig gisting, har var sokallaður hitapottur sum bleiv brúktur av fleiri, tað kvøldi var práta dúliga tí frídagur var dagin eftir.



*Føroyska ferðalagið vitjaði eisini Geysir – eitt tað kendasta ferðamálið í Íslandi*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Hveragerði
### Fríggjadagur t. 5/3´04

Sovið var eitt sindur longri enn vanligt, men vakur var morgunin. Eitt lítið kavafølv, blanka logn og sólskin.

Góður morgunmatur stóð klárur at eta. Nú følist at frídagur var, vit sótu øll avslappaði og prátaðu og nýttu friðin. Bussurin kom so, og vit tóku viðføri og koyrdu inn til Reykjavíkar. Har vit settu viðføri inn á kunningarstovuna og avtalaðu tíð nær vit skuldu hittast aftur. Síðan tóku vit okkum saman í smærri bólkar og spákaðu á Laugarvegnum (handilsgøtan) men allan dagin gingu vit okkum á hvønn annan, nýttu frídagin og góða veðrið.

Vit møttu øll til tíðina aftur á kunningarstovuni og tóku leigubilar á flogvøllin. Flogfari skuldi lætta kl 19 til Føroyar, men av einari ella aðrari grund var flogfari seinkað, so tað mundi vera ein góður tími, vit vóru seinkað, so har traff ein nógv kend fólk áðrenn vit fóru í flogfari.

Túrurin heim í flogfarinum gekk væl, vit komu í Vágar og fóru so tey flestu í bussin, nøkur høvdu bil sjálvi. Komin til Havnar, var dóttir mín Emy og tók í móti mær. Ein góður túrur at enda komin.

Samanumtikið, kann man siga um Íslendingar, at teir eru heilt sera blíðir. Fær vanliga ferðafólkið slíkan blíðskap, so er gott at ferðast í Íslandi. Ein legði til merkis, at hvar í ein kom, so høvdu tey eitt fólk at greiða frá søguni har ein var staddur. Gott er at vita, at vit hava góðar grannar fyri vestan, sum gagnligt er at samstarva við.

Eg skyldi tykkum øllum, ið vóru í ferðalag saman við mær, eina hjartans tøkk fyri vinsemi ímóti mær á ferðini í Íslandi, og ein tøkk til BP, sum eisini stuðlaði ferðini.

Luttakarar á ferðini vóru hesi:
Dávíd Samuelsson (ferðaleiðari) kunningarstovan í Reykjavík
Kristian Olsen kunningarstovan Klaksvík
Rannvá Troels kunningarstovan Runavík
Heidi Kilgoner kunningarstovan Vági
Poula Strøm kunningarstovan Tvøroyri
Anna Maria Ellingsgaard kunningarstovan Tórshavn
Petur M Petersen kunningarstovan Fuglafirði
Anna Sofía Nordendal kunningarstovan Miðvági
Sólvit Simonsen kunningarstovan Sandur
Per Hansen Ferðaráð Føroya
John Eysturoy Ferðaráð Føroya
Edvard í Skorini Sosialurin



TING- HELLAN

# Tinghellan – nýtt debatforum í Sosialinum



*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Seinastu mongu árini hevur Sosialurin ment seg til eitt veruligt tíðindablað fyri allar føroyingar. Aftrat hesum fjølbroytta tilfari úr øllum pørtum av landinum vil blaðið eisini gera meira við orðaskiftið - debattina og fara vit í nýggja Vikuskiftissosialinum hvørja viku at bjóða okkum fram sum sterkasta og vónandi mest áhugaverda og seriøsa debattforum í Føroyum. Sosialurin hevur leingi havt kronikkir, klummur, lesarabrøv og tinghellur, sum tilsamans hava verið góð íkast í føroysku debattina. Hereftir ætla vit at skipa hetta meiri miðvíst til m.a. eina sektión við kjaki og kønum greiðningum eina ferð um vikuna.

Debattin í Sosialinum fer tí sum nakað nýtt eisini at fylla nakrar síður hvørt vikuskifti, sum tí verður eitt vikuskiftisblað við ordiligum krammi í. Debattin, sum fær heitið "Tinghellan" , fer at fevna um sjálva tinghelluna, ið er ein analysa av viðkomandi politiskum og samfelagsligum evnum, saman við journalistiskum frásagnum, ið tengdar eru at analysuni. Síðani vera klummur og kronikkir, sum eru heldur fríari og leysari hugleiðingar um samfelag, mentan og hvørt av sínum. Eisini fara vit at hýsa aktuellum viðmerkingum frá tingfólki ella øðrum, ið sjálvi eru partar í samfelagsmeldrinum. Vit fara so at skifta millum at taka upp ávís evni, sum verða viðgjørd burturav í debattini í Vikuskiftisblaðnum ella vit taka ymisk mál og evni fram í sama blað.

Skal debattin í Sosialinum eydnast væl, er tað neyðugt at fáa nøkur av mongu skilafólkum okkara upp úr holunum at skriva um evni, sum tey kenna til og duga greiða frá. Debattin hevur fleiri góðar hjálparredaktørar, eitt nú Boga Eliassen og Kára á Rógvi, ið eisini eru til reiðar at geva fólki ráð og ‘feed-back’, áðrenn grein fer í blaðið.

Sosialurin ætlar, um hetta tiltak eydnast okkum, at geva tinghellugreinar, kronikkir og klummur út í bóklingi til jóla á hvørjum ári. Heitið verður "Tinghellan – íkast til almenna orðaskiftið". Hetta gera vit, tí góðar tinghellugreinar og kronikkir røkka longur fram enn til dagin, tær eru skrivaðar, og skulu kunna vera partur av framhaldandi orðaskiftinum.

Eisini kann tað vera gagnligt fyri sama orðaskiftið og fyri demokratiseringstilgongdina í samfelagnum, at so mong sum til ber fáa atgongd til hesa debattina eitt nú sum klassasett í skúlunum umframt at hon verður til taks á almennum støðum og stovnum, so debattin í Vikuskiftissosialinum gerst partur av førninginum hjá almenningi,, felagsskapum, embætisfólki og politikarum.,

Øll kunnu vera við til at fylla karmarnar í Tinghelluni út.



*Kári á Rógvi og Bogi Eliassen eru hjálparredaktørar á Tinghelluni*

Sjálvt grundarlagið undir slíkum tiltaki er tað fría orðið tvs. at her skulu allar hugsanir og meiningar hava innivist. Hevur tú hug at vera við antin sum tinghellu-, kronikk- ella klummuskrivari vilja vit fegin hoyra frá tær. Tú kanst ringja til okkara, 341800 og spyrja eftir Jan ella Eirikki ella tú sendir okkum ein teldupost: debattin@sosialurin.fo

## James Bond, Bin Laden og Bush

TINGHELLAN/KLUMMAN
*Finnbogi Ísakson*



Summarið er farið afturum, og við tí munna endursendingarnar hjá Sjónvarpinum av gomlum James Bond-filmum eisini vera farnar. Innihaldsliga hava filmarnir ikki nógv uppá seg. Tað, sum mundi hugtaka ta stóru fjøld av hyggjarum kring allan heim, tá filmarnir komu, mundi heldur vera tann ómetaliga framkomna tøknin, sum James Bond hevði at ráða yvir. Hjá honum var einki óført: bilar sum skutu rakettir, ur sum vóru magnetisk og kundu saga jarn, bilar sum flugu um áir. Og mangt, mangt annað.

Tað er framvegis nokkso stuttligt at síggja agentin 007. Men ikki so stuttligt sum fyrr, tí eftirsíðan hevur tøknin í okkara gerandisdegi ment seg so nógv, at vit sjálvi kunna í mongum førum gera meira enn nakar James Bond.

Eg skrivaði, at innihaldsliga høvdu filmarnir ikki so nógv uppá seg. Har var kortini altíð ein kjarni, sum var áhugaverdur: agenturin yvir øllum agentum varð altíð sendur avstað at bjarga heiminum undan onkrum ørvitisfiski, sum vildi vinna ræði á allari verðini. Heimurin skuldi allur terroriserast til at akta, og hesin heimsvaldsharrin skuldi sjálvandi - umframt at fáa alt vald - eisini gerast uppaftur ríkari, enn hann var. Hesin búrhundurin var ikki verri útgjørdur tøknifrøðiliga enn 007. Eisini hevði hann hópoyðingarvápn, so tað forsló.

Ikki veit eg, um Osama Bin Laden hevur fingið hugskotið frá James Bond-filmunum. Men eitt er vist: framferðarhátturin er tann sami. Heimurin skal terroriserast til at akta. Hví hann skal akta er heldur ógreiðari. Bin Laden og viðhaldsmenn hansara eru muslimskir fundamentalistar, verður sagt. Tað kunna teir bara vera, um teir hava hug til tað. Men hví skal allur Vesturheimurin leggjast í sor fyri tann skyld?

Okkurt bendir á, at Al Qaeda og Bin Laden vilja - eins og bølmennið í James Bond-filmunum - hava ræði á øllum heiminum. Felagsskapurin hevur ikki hópoyðingarvápn, men serfrøðingar ivast ikki í, at teir stremba eftir at fáa slík.

Í dag eru trý ár liðin, síðani hesin felagsskapur framdi sína mest umfatandi atsókn higartil. Álopini við ferðafólkaflogførum sum bumbum á World Trade Center og Pentagon kravdu útivið 3000 mannalív.

Tað er einki at siga til, at amerikanska stjórnin og heimurin yvirhøvur settu sær fyri at fáa steðgað virkseminum hjá Al Qaeda. Amerikanarar vaknaðu við kaldan dreym, hóast kanningar aftaná hava víst, at teir áttu at verið vaknaðir fyrr.

Strategiin, sum amerikanarar løgdu, var at leypa á lond. Tað eydnaðist at fáa breiða undirtøku í ST fyri at leypa á Afghanistan, har teir hildu fyri vist, at Talibanstýrið hevði rottað seg saman við Bin Laden og Al Qaeda. Sameindar herdeildir róku talibanarnar frá og settu eitt nýtt stýri í landinum. Men Bin Laden fingu teir ikki fatur á, og nýggja stýrið man vera so sum so.

Næsta málið var Irak. Amerikanskar og bretskar fregnartænastukeldur vildu vera við, at einaræðisharrin Saddam Hussein hevði hópoyðingarvápn - evnafrøðilig, lívfrøðilig og kanska eisini kjarnorkuvápn - og at hansara stýri hevði tætt samskifti við Bin Laden.

Hesaferð gekk ikki so væl: amerikanarar fingu ikki undirtøku frá ST at leypa á, tí londini hildu ikki nakað prógv vera fyri uppáhaldinum um hópoyðingarvápn og samstarv við Al Qaeda. Stór lond sum Frakland, Týskland, Russland og Kina vildu ikki vera við í átakinum.

Onnur lond vildu. Irak varð álopið, illmennið Saddam Hussein varð rikið frá valdinum, og hann varð tikin, og síðani 1. juni hevur eitt irakiskt stýri, sum amerikanarar hava sett, tikið við landsins leiðslu.

Men, men - hóast kanningarnar, sum ST gjørdi, og síðani kanningar, sum amerikanskir og bretskir serfrøðingar hava gjørt, eru ongi hópoyðingarvápn funnin. Heldur einki prógv er fyri nøkrum sambandi yvirhøvur millum Bin Laden og Saddam Hussein. Og friður valdar ikki í landinum, tvørturímóti. Irakarar stríðast ímóti hersetingarvaldinum, og fólk láta lív hvønn einasta dag. Tá Bush í mai 2003 kunngjørdi, at kríggið var av, høvdu einir 300 amerikanskir hermenn látið lív. Nú er talið oman fyri 1000.

Amerikanarar hava ikki lært nógv av sínum mistøkum. Í seksti- og sjeytiárunum royndu teir at bumba partisankríggið í Vietnam niður við napalm og øðrum fjandansskapi. Tað bar heldur ikki til. Tað letur seg rætt og slætt ikki gera at bumba ein fígginda, sum tú ikki sært, og sum tú ikki veitst, hvør er ella hvar.

Man tað ikki vera tað sama við hesum kríggjunum? Al Qaeda arbeiðir í tí loynda og loypur á, har ein minst vantar tað. Tað ber ikki til at rudda yvirgang burtur við at bumba lond í sor. Har mugu heilt aðrir útvegir finnast. Og tað skula frægari heilar til enn mín at finna útav, hvørjar leiðir eru gongdar.

Hendan greinin verður skrivað, meðan eg eri staddur í Rom. Ása og eg ætlaðu okkum eitt rend til London í summar, men tað varð av ongum. Í staðin fóru vit við Atlantsflog til Keypmannahavnar, steðgaðu á í Danmark í tveir dagar og hildu so leiðina fram við Alitalia til Rom.

Felags fyri allar hesar tríggjar býir er, at teir eru høvuðsstaðir í londum, sum vóru við í tí amerikanskt fyristílaða álopinum á Irak. Og felags fyri øll trý londini er, at yvirgangsfelagsskapir hava hótt við at fremja álop á tey. Tað ber bara ikki til at ganga og hugsa um tað alla tíðina, tí so kunna vit als ikki flyta okkum í verðini.

Niðurstøða mín er, at heimurin er vorðin uppaftur ótryggari at liva í, eftir at álopini á Afganistan og serliga Irak vórðu framd. James Bond fekk hvørja ferð forðað fyri, at ein yvir-gangskroppur vann heimsvald. Men George W. Bush er ongin James Bond. Hann hevur bara gjørt ilt verri.